Fylgiskjal 4

Tórshavn, tann 25. januar 2021

Fiskimálaráðið
Yviri við Strond 15
100 Tórshavn

Viðv. hoyringssvar viðvíkjandi broytingum í Sjófeingislógini.

Fiskimálaráðið hevur sent uppskot til broytingar í Sjófeingislógini til ummælis.

Felagið Nótaskip loyvir sær hervið vinarliga at gera viðmerkingar til ætlanina um at broyta grein 49 í lógini soleiðis, at kvotur til vinnuligar royndir og verkætlanir, kunnu verða útlutaðar til umsøkjarar, sum ætla at útvega sær fiskifar, og har kravið um veiðiloyvið ikki er ein treyt.

Her verður lagt upp til at økja fiskiorkuna í føroyska uppisjóvarflotanum. Tað halda vit ikki er skilagott.

Í fyrsta lagi halda vit, at tað eigur at verða hildið fast við kravið um veiðiloyvi. Felagið Nótaskip ynskti at fáa hesa skipan aftur í Sjófeingislógina, tí hetta er tað frægasta amboðið, ið vit hava, fyri at avmarka fiskiorkuna.

Í øðrum lagi er fiskiorkan í verandi uppisjóvarflota ríkiliga stór til verandi kvotur, og ein øking í fiskiorkuni hevur við sær, at úrslitið verður vánaligari hjá øllum pørtum, t.v.s landið, reiðarí og manningar, tí vit brúka størri fíggjarliga orku enn neyðugt, til at fiska somu kvotur.

Í triðja lagi duga vit ikki at síggja, hvussu eitt uppisjóvarskip kann fáa ein lønandi rakstur við at fiska kvotur til vinnuligar royndir og verkætlanir, tí hesar kvoturnar eru avmarkaðar, og ætlanin er helst, at tær skulu lutast út til fleiri umsøkjarar.

Út frá hesum mæla vit frá, at henda broytingin í grein 49 í Sjófeingislógini verður framd.

Vinarliga
Jógvan Jespersen,*stjóri*

NÓTASKIP

Felagið Nótaskip
Faroese Pelagic Organization
Óðinshædd 7
P.O.Box 1038
110 Tíórshavn
Faroe Islands
Phone + 298 739910
E-mail: notaskip@notaskip.fo
www.notaskip..fo